# TAÐ HENDIR ...

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein



## BLAIR UM SEG SJÁLVAN

Fyrrverandi enski forsætisráðharrin Tony Blair hevur skrivað sínar endurminningar, og hann smæðist ikki fyri at avdúka ymiskt, sum fór fram í hansara tíð sum politiskur leiðari í Bretlandi. Tony Blair var forsætisráðharri í 10 ár, og í hansara tíð hendi mangt og hvat. Í endurminningunum greiðir Blair millum annað frá um hansara samband við eftirmann sín Gordon Brown, um kríggj og yvirgang og um persónarligar upplivingar.

**TONY BLAIR**
A Journey
Hutchinson 1/9-



## SALT Í BRENNIDEPLINUM

Angelina Jolie spælir CIA agenturin Evelyn Salt, sum verður løgd undir at arbeiða fyri russarar. Hon dugir nógvar snildir og sleppur undan teimum, sum jagstra hana. Men hvør er Salt, og hvussu skal hon reinsa seg fyri ákærunum? Spennandi Hollywood action-filmur.

**SALT**
Biograf-filmur
Frumsýndur 9/9



## TRÓNDUR Í FOCUS

Ein av fremstu føroysku listarmonnunum letur í dag upp framsýning í Galerie Focus í Havn. Tróndur Patursson fer at sýna fram verk, sum hann kallast Náttúrlýsingar. Í dag kl. 16.00 verður fernisering í Galerie Focus.

**TRÓNDUR PATURSSON**
Galerie Focus
Fríggjadagin 10/9 kl. 16.00

## NÚ SKAL ÍF STEÐGA NSÍ

Seinastu tríggjar dystirnar hevur oddaliðið NSÍ ikki vunnið, og tí er tað blivið meira spennandi í toppinum í Vodafonedeildini aftur. Nú hevur NSÍ havt eitt frívikuskiftið, og sunnudagin skulu teir vísa, at teir framvegis ætla sær at liggja á odda. ÍF er eitt av liðunum, sum er í hølunum á NSÍ, og nú skulu fuglfirðingar royna at spæla seg í eina góða støðu til endaspurtin um føroyameistaraheitið.

**NSÍ-ÍF**
Vodafonedeildin
Sunnudagin 12/9 kl. 15.00

## GÓÐI JOHN

Dear John er filmur um kærleika, skilnað og kríggj. John Tyree er hermaður í US Army, og tá hann er heima í feriu hittir hann av tilvild Savannah. Tey gerast góð, og hann lovar henni, at hann skal ikki leingja sáttmálan við herin. Men so henda yvirgangsálopini 11. September 2001, og so broytist nógv.

**DEAR JOHN**
dvd-filmur





## BESTU HUNDARARNIR SKULU FINNAST

Leygardagin verður ársins seinasta kapping hjá Føroya Civila Hundaførarafelag. Kappingin verður á Leynavatni, og føroyamestararnir skulu nú finnast. Kappast verður millum annað í lýdni og rally lýdni. Eisini verða fleiri kappingar til stuttleika og onnur tiltøk eru á skránni hendan dagin:

**HUNDA- OG FAMILJUTILTAK**
Leynavatn
Leygardagin 11/9 kl. 10.00-



## TEMA UM 9/11

Í morgin er ársdagurin fyri stóra yvirgángsálopinum á USA í 2001. Danska sjónvarpsrásin DR2 hevur temakvøld um 9/11. Á skránni verður millum annað ein dokumentarsending, sum bretska BBC hevur framleitt.

**9/11 TEMA**
DR2 leygarkvøldið 11/9 kl. 19.00-